Skjal 1

**Bjørn á Heygum, adv.**
**Alfred Petersen, adv.**
Bøgøta 16
100 Tórshavn

Postsmoga 164
110 Tórshavn
Telefon (298)351710
Telefax (298)351711

| | | |
|---|---|---|
| Føroya Sparikassi: | konto nr. | 200.485.4 |
| Føroya Banki: | konto nr. | 152.941.4 |
| Norðoya Sparikassi: | konto nr. | 150.643.3 |
| Suðuroyar Sparikassi: | konto nr. | 101.115.5 |


Vinnumálaráðið
Tinganes
FO-100 Tórshavn

Tórshavn tann 27.11. 2006

J.nr. 50027

**Viðv. avtøku av Endurgjaldsgrunni Alivinnunar.**

Endurgjaldsgrunnur Alivinnunar var stovnsettur og rekur sítt virksemi við støði í løgtingslóg nr. 87 frá 28. maj 1996.

Samb. § 1 í lógini er ásett, at grunnurin kann veita endurgjald fyri tiltøk framd við grundarlag í § 7 i løgtingslóg nr. 26 frá 30 april 1987 um sjúkur hjá fiski og skeljadjórum.

T.v.s. heimildin hjá grunninum til at veita endurgjald er avmarkað til tiltøk framd við støði í viðkomandi lóggávu.

Samb. løgtingslóg nr. 16. frá 28. februar 2001 um djórasjúkur § 51 er ásett, at samstundis sum henda lóg kemur í gildi fer løgtingslóg nr. 26 frá 30 april 1987 úr gildi.

Við øðrum orðum er grundarlagið hjá Endurgjaldsgrunni Alivinnunar at veita endurgjald samb. løgtingslóg nr. 87 frá 28. maj 1996 burtur, tá løgtingslóg nr. 26 frá 30 april 1987 er farin úr gildi.

Tað kann samstundis staðfestast, at tað ikki verða reist fleiri krøv mótvegis Grunninum við støði í gomlu reglunum, tá tíðin nú er farin frá einum hvørjum endurgjaldskravi hesum viðvíkjandi.

Samb. omanfyristandandi er greitt, at Endurgjaldsgrunnur Alivinnunar ikki hevur nakað endamál longur.

Út frá hesum mælir nevndin fyri Endurgjaldsgrunn Alivinnunar til, at grunnurin verður avtikin samb. § 8 í løgtingslóg nr. 87 frá 28. maj 1996.

Tá grunnurin er stovnsettur til tess at stuðla alivinnuni, verður mett natúrligt, at grundfæið fer í okkurt tiltak alivinnuni til frama.

Nevndin fyri Endurgjaldsgrunn Alivinnunar skal tískil mæla Vinnumálaráðnum til at peningurin verður nýttur endamál, sum út frá eini heildarmeting koma alivinnunin til góðar, t.d. til eina tryggingarskipan ella gransking.

**Bjørn á Heygum, adv.**
**Alfred Petersen, adv.**
Bøgøta 16
100 Tórshavn

Postsmoga 164
110 Tórshavn
Telefon (298)351710
Telefax (298)351711

| | | |
|---|---|---|
| Føroya Sparikassi: | konto nr. | 200.485.4 |
| Føroya Banki: | konto nr. | 152.941.4 |
| Norðoya Sparikassi: | konto nr. | 150.643.3 |
| Suðuroyar Sparikassi: | konto nr. | 101.115.5 |

Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at Havbúnaðarfelagið hevur eitt uppskot um, at helvtin av peninginum verður latin Nattúrvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum – Knút Simonsen – til eina verkætlan har streym- og aldumátingar verða gjørdar á føroysku alifirðunum og at hin helvtin verður latin P/F Fiskaaling til gransking innan alivinnuna.

Vegna nevndina fyri Endurgjaldsgrunn Alivinnunar:

Sjúrður Horsdal

Andrias Reinert

Absalon í Buð